

www.oljan.fo

**Jan Müller** 25 - 08 - 2013

# Grønlendski innlandsísurin minkar við metferð

Grønlandski innlandsísurin bráðnar við metferð. Hetta vísa m.a. myndir, sum eru tiknar í í Grønlandi fyri 80 árum síðani og aftur í dag. Tað skrivar Politiken. Myndirnar vísa, at ískanturin hevur flutt seg 6 kilometrar hesi árini. Tað er heitari veðurlag, sum hevur fingið ísin at bráðna skjótari skrivar blaðið. Grønlendskir jøklar eru í dag høvuðsorsøkin til, heimshøvini hækka við tveimum millimetrum um árið. Tað eru myndir, sum danir tóku í 1932, sum nú kunnu prógva, hvussu nógv ísurin er bráðnaður. Myndirnar vórðu tiknar í sambandi við samráðingar millum Norra og Danmark um rættindini til øki í Eysturgrønlandi fyri 80 árum síðani. Myndirnar vórðu funnar aftur í 2010, og fyri trimum vikum síðani vórðu nýggjar myndir tiknar á júst sama stað. Veðurlagsgranskarar siga sambært blaðnum, at myndirnar koma sera væl við, tí tær kunnu fáa heimin at lata upp eyguni fyri veðurlagsbroytingunum. Myndirnar vísa, hvussu stórar broytingarnar hava verið. Innlandsísurin í Grønlandi minkar við 600 gigatonsum um árið. Myndirnar vekja ikki minst ans í Grønlandi, har ráðharrin fyri náttúru og umhvørvi, Miiti Lynge sigur, at tað er tvingandi neyðugt, at heimssamfelagið avmarkar útlátið av $CO_2$ gassum.